Fra: Rannvá Sólheim
Sendt: mánadagur, 25. januar 2021 16:01
Til: 'bustadir@bustadir.fo' <bustadir@bustadir.fo>; 'andras@bustadir.fo' <andras@bustadir.fo>
Emne: Spurningar frá Trivnaðarnevndini

Til Bústaðir,

Viðvíkjandi viðgerð av **LM-064/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn** (Víðkan av stýri, heimild at útvega lutaíbúðir, heimild at veita ráðgeving um alternativar byggihættir, økt lánsheimild til bústaðabygging, heimild at stovna partafelag o.a.):

Trivnaðarnevndin ynskir at fáa skrivligt svar upp á hesar spurningar:

1. Hvussu fíggjar Bústaðir sína íbúðabygging?
2. Hvussu stórur partur av byggikostnaðin verður avskrivaður?
3. Hvussu ásetir Bústaðir avkastkravið?
4. Hvørja ávirkan kemur avkastkravið at hava á leigukostnaðin?
5. Hvussu verður umsitingarkostnaðurin roknaður út, og hví er umsitingarkostnaður so høgur?

Harafturat ynskir nevndin, at fáa eina skrivliga frágreiðing um, hvussu lutaíbúðarkonseptið verður samansett, og um tað er munur á, um tað verður bygt úti á bygd ella í miðstaðarøkinum.

Trivnaðarnevndin ynskir at fáa svar upp á hesar spurningar skjótast til ber.

Vinarliga

Rannvá Sólheim
Nevndarskrivari/løgfrøðingur